2 árin
Telefon: 311820 Fax: 314720 E-mail: post@sosialurin.fo

# Fara eftir teimum sum ikki gjalda

**SJÓNVARP.** Danska stjórnin ætlar at fara harðari fram móti teimum, sum ikki gjalda stjónvarpsgjald til Danmarks Radio.

Hetta segði danski mentamálaráðharrin, Elsebeth Gerner Nielsen, tá stjórnin legði fram sokallaðu fjølmiðlasemjuna fyri árini 2001-2004.

DR er almenna danska sjónvarpið, og øll eiga at gjalda sjónvarpsgjald fyri at hyggja eftir teirra sendingum. Men tað eru tað ikki øll sum gera.

Danmarks Radio hevur brúk fyri 1,8 milliard krónum afturat næstu fýra árini, og ístaðiin fyri at hækka almennu játtanina, ætlar stjórnin at fáa fleiri fólk at gjalda sjónvarpsgjald.

Øll húski og virki í Danmark fara at fáa girokort sendandi, og hava tey ikki sjónvarp, skulu tey undirskriva eina váttan umat so er.

Mett verður, at eini 170.000 fleiri sjónvarpsgjøld eiga at verða goldin í Danmark.

Í fjølmiðlasemjuni verður skotið upp, at TV2 fær fjórðu landsdekkandi útvarpsrásina. Hinar tríggjar hevur Danmarks Radio undir hond, og tí verður einkarætturin hjá DR til at senda landsdekkandi útvarpsrásir brotin.

Fleiri hava ligið fram við eftir at fáa hesa rásina, millum annað Danmarks Radio og Berlingse Hus, men nú verður tað TV2, sum fer við henni.



Tveir av leikarunum í nýggja leikinum, sum Klaksvíkar Sjónleikarfelag frumsýnir í kvøld, Jógvan Jacobsen og Hans Hjalti Skaale. Mynd: Símun á Høvdanum

# Frumsýning av pyjamas

**SJÓNLEIKUR.** Í kvøld fer Klaksvíkar Sjónleikarfelag at hava frumsýning av nýggja lekinum S*eks í pyjamas*. Hetta er ein franskur skemtileikur, sum Mac Coment hevur skrivað. Andrias Justesen hevur umsett til føroyskt.

Seinastu tveir mánaðirnar hava leikararnir í Klaksvíkar Sjónleikarfelag vant leikin, og ætlanin var at frumsýna hann seinasta vikuskiftið. Men sjúka kom upp í, og tí var frumsýnginin útsett.

Leikararnir, sum spæla við, eru: Jógvan Jacobsen, Jan Gardar, Súsanna Jacobsen, Adelborg Linklett, Hans Hjalti Skaale og Jórun Ljósstein.

Egi Dam hevur leikstjórnað leikin, sum sigst verða bæði skemtiligur og hendingaríkur.

Frumsýningin verður í Atlantis í kvøld klokkan 20.00, og næstu dagarnar halda sýningarnar fram.

# Oyðilegði virðislønina

**ÓHAPP.** Sjónleikarin Jesper Asholt kvetti høvdið av Bodil-virðislønini, sum hann vann seinasta vikuskifti. Bodil er ein donsk filmsvirðisløn og er ein standmynd. Eftir handanina kom ein sjampanjufløska ov nær standmyndini hjá Asholt, og høvdið reyk av. Talan var um eitt óheppið óhapp, og nú má Asholt, sum fekk virðislønina fyri sín leiklut í filminum *Mifunes sidste sang* biða fyrireikararnar um eina nýggja virðisløn.

Tað er hent eina ferð áður, at ein Bodil-virðisløn er oyðiløgd. Tað var í 1996, tá Carsten Rudolf fekk ein Bodil fyri filmin *Menneskedyret*. Hann misti standmyndina á pallinum, og hon fór í knús.

# Oscar-stuldur

**OSCAR.** Løgreglan í Los Angeles sigur seg hava funnið fram til, hvør tað var, sum stóð fyri stuldrinum av Oscar-virðislønunum.

Virðislønirnar, sum vóru ætlaðar handanini í ár, blivu burtur undir flutninginum. Fyrr í vikuni vórðu tær funnar aftur í Koreatown í Los Angeles. Løgreglan sigur, at tað vóru tveir starvsmenn hjá flutningsfelagnum Roadway Express, sum stóðu fyri stuldrinum. Teir væntaðu, at teir fóru at fáa pengar burtur úr stuldrinum, men soleiðis gekk ikki.

Onkrar av virðirslønunum vóru so illa farnar, at tær máttu skiftast út við nýggjar.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Wed 22. Mar. 2000
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** sam-oes@frisurf.no
**Reply to:** sam-oes@frisurf.no

TELDU-POSTURIN

# Oljusjeikur og konumaður

Á marsipankløddu lágkøkuni brunnu 41 smá ljós. Við einum skálkabrosi blásti føðingardagsbarnið ljósini. Men hóast køku og kakao, hevði Jens ikki nógvar minuttir at njóta veitsluróman.

Hetta var dagin fyri dagin, og fleiri telefonsamrøður bíðaðu. Næsta morgun skuldi hann fyri Harald kong við nýggja fylginum av ráðharrum, sum skulu stýra Norra til komandi val um hálvtannað ár.

Jens Stoltenberg (smakka eftirnavnið!) er yngsti forsætisráðharri, Norra nakrantíð hevur havt. Men tad merkir ikki, at hann er óroyndur. Tvørtur ímóti telist hann millum tey mest garvaðu á Stórtinginum.

Stoltenberg yngri, sum hevur útbúgving í samfelagsbúskapi, hevur stórt sæð ongantíð gjørt annað enn verið politikari. Burtursæð frá einum stuttum klombri sum journalistur og ráðgevi. Hann er næstan føddur inn í reyðu leðurstólarnar í tinghúsinum á Leyvabakkanum í Oslo. Sonur navnframa Thorvald Stoltenberg, sum millum annað hevur borið heitið sum verjumálaráðharri, uttanríkismálaráðharri og friðarmillumgongumaður í fyrrverandi Jugoslavia, áðrenn hann gjørdist norskur sendirráðharri í Danmark. Stoltenberg eldri er nú eftirlønarmaður og kann vera dadda hjá abbabørnunum, meðan sonurin sessast á ovastu maktrókini.

Jens Stoltenberg kundi sitið í forsætisráðharrastólinum longu fyri fýra árum síðani. Í 1992 segði Gro Harlem Brundtland seg frá sum floksleiðari í Arbeiðaraflokkinum. Harlem Brundtland - ella Gro, sum øll rópa hana her - ynskti tá unga Stoltenberg í sess sín. Hóast Gro ongantíð segði tað alment, var lítil ivi um, at hon metti Jens vera arvaprinsin í Arbeiðaraflokkinum. Men tað gjørdist Thorbjørn Jagland, sum tók við sum floksleiðari, og í 1996 sum forsætisráðharri, tá Gro fór frá. Undir seinastu Gro-stjórnini frá 1993 til 1996, var Jens Stoltenberg ídnaðar- og orkumálaráðharri. Tá Jagland tók við, gjørdist Stoltenberg fíggjarmálaráðharri.

Sum orkumálaráðharri ferðaðist Stoltenberg kring knøttin til øll tey týðandi oljulondini. Hann fekk skjótt eyknevnið »oljusjeikurin«. Á norskum merkir »sjeikur« ikki tað sama sum »sjeikaligur«, hóast eisini seinra heitið hóskar væl til henda prúða mannin. Men arabisku oljusjeikarnir mundu neyvan halda tað vera hóskiligt, at norski oljumálaráðharrin ansaði børnum, fór til handils og vaskaði upp. Og Stoltenberg leggur stóra orku í at byggja eina hugmynd av sær sjálvum sum »konumaður«, ella rættari sagt »tad-er-sjálvsagt-at-deila-húsarhald-og-barnaansing-tá-bæði-arbeiða-útimaður«.

Við einum langum hala av fjølmiðlafólki og fotografum hevur hann fylt beriposarnar við mjólk, breyði og páleggi. Sum um tað er ein ófrávíkilig avtala, at tílíkt má hann gera hvønn dag. Eingin umbering at kongur júst hevur biðið hann skipað nýggja stjórn! Ikki heilt trúverdugt kanska, men kortini ein virkin háttur at fáa boðini út um, at hann umboðar eitt nýtt ættarlið í norskum politikki.

Fyri tíggju árum síðani leiddi Stoltenberg eina nevnd kalla »mannsrolleutvalget«. Nevndin skuldi granska (trongu) korini hjá manninum í nýggja javnstøðusamfelagnum, har tað á ongan hátt er nóg mikið at ein maður er ein maður.

Jens Stoltenberg tykist hava funnið sær sítt pláss. At gerast stjórnarleiðari - og keypa døgurða og Dunnald til børnini sama dag - nærri ber helst ikki til at koma hugmyndini av einum, sum fær privatu og yrkisligu leiklutirnar at renna saman í eina hægri eind. Sjálvt Tony Blair gerst eitt sindur gráur og gamalsligur undir liðini á Jensi Stoltenberg...

**Bjørt Samuelsen, Oslo**

post@sosialurin.fo



## FØÐINGAR

14. mars fingu Hanna og Marner Jacobsen, Klaksvík, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3600 gr.

14. mars fingu Elisabeth og Sámal Eyðfinn Akursmørk, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3500 gr.

14. mars fingu Asta og Gimmi Svaðstein, Klaksvík, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3670 gr.

16. mars fingu Heidi og Karstin Hansen, Tórshavn. ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3900 gr.

16. mars fingu Jens Godik og Heidi Højen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4100 gr.

16. mars fingu Lydia Jacobsen og Terji Jensen, Esbjerg, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3700 gr.

17. mars fingu Marina Haraldsen og Tony Olsen, Miðvágur, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 3900 gr.

18. mars fingu Anna-Kari Thomsen og Bent Hassing, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3435 gr.

18. mars fekk Elsa Lyngvej, Hestur, eina dóttir. Hon var 50 cm. long og vigaði 3050 gr.

20. mars fingu Karin Bjartalíð og Tryggvi Gunnarstein, Klaksvík, eina dóttir. Hon var 50 cm. long og vigaði 3000 gr.

21. mars fingu Mary-Britt Olsen og Jens Pauli Petersen, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 3900 gr.

21. mars fingu Janet Fríða Johannesen og Johnny Gaard, Hoyvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3600 gr.

21. mars fingu Siri Ann Lorenzen og Petur Eli Persson, Hoyvík, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3050 gr.

21. mars fingu Hanna og Gunnar Hansen, Esbjerg, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

## ANDLÁT

16. mars:
**Lítla Anna Maria,** dóttir Esmar og Jeanni Sørensen, Viðareiði, 2 ár
17. mars
**Hjartan Sørensen,** Trongisvágur, 78 ár
**Frits Magnussen,** Hvidovre, ættaður úr Saltangará, 70 ár
18. mars
**Georg Kjærbo,** Sumba, 68 ár
19. mars
**Turid Petersen,** Klaksvík, 90 ár
21. mars
**Amanda Jensia Thomsen,** fødd Kjærbæk, ættað úr Sumba, búsitandi á Tvøroyri, 87 ár
**Ólavur Patursson,** Kirkjubø, 45 ár
22. mars
**Leivur Jespersen,** Hov, 86 ár
**Magnus á Dalbø,** Miðvágur, 59 ár

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 25. mars:* Georg Egholm, tlf. 448016
*Sunnudagin 26. mars:* Georg Egholm, tlf. 448016

**Norðoyggjar:**
Jaspur Petersen, tlf. 456400

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

**Tannlæknavakt,** Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.

## KIRKJUR & SAMKOMUR

### Føstugudstænastur

**Sunnudagin 26. mars**
*Sandavágur:* kl. 18, David Johannesen
*Kvívík:* kl. 17, urguleikari: Oddvør Johansen
*Hellurnar:* kl. 19, Emil Olsen

### 3. sunnudag í føstu

*Havnar kirkja:* kl. 11, Sverri Steinhólm
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Nólsoy:* kl. 12, Bjarni Bæk
*Christianskirkjan:* kl. 11, lestur
*Húsar:* kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10 og
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Meinhard Bjartalíð
*Hestur:* kl. 12, Heri Joensen
*Tjørnuvík:* kl. 12, altarg., Marjun Bæk
*Hvalvík:* kl. 12, Martin R. Jacobsen
*Vestmanna:* kl. 12, altarg., Uni Næs
*Saksun:* kl. 11, Sonja Klein
*Oyndarfjørður:* kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Rituvík:* kl. 11, altarg., Jónsvein Bech
*Miðvágur:* kl. 12, David Johannesen
*Norðskála:* kl. 11.40, skriftamál, kl. 12 messa,
*Eiði:* kl. 17, messa, Emil Olsen
*Vágur:* kl. 11, Elsa Funding
*Sandur:* kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
*Gøta:* kl. 16, familjugudstænasta, Sverri Steinhólm

### Frá Ebenezer

Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti og kl. 21 útimøti.

Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Tórshavnar Hvítusunnusamkoma

Sunnudag kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti.

### Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 19 møti.

### Rhema á Hálsi

Fríggjakvøldið kl. 18-19 ATAP barnaklubbi.

Leygarmorgunin kl. 9-12.30 Bíbliuseminar, deilt yvir 3. lekt. Evni: Bíbilsk økonomi. Lærari: Símun Jacobsen (eisini verður kaffisteðgur).

Leygarkvøldið kl. 21 verður Café kvøld við luttøku av Lindu og Rakul Petersen og Rúna Kirke, har tey syngja og vitna.

Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli.

Mánadag til fríggjadag kl. 06 morgunbøn. Øll eru vælkomin.

### Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 06 morgunbøn, kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 06 morgunbøn, kl. 11 morgungudstænasta, kl. 18 sangmøti v/ Sólbjørg Zachariasen.

Mánadagin kl. 06 morgunbøn, kl. 20 bønarskúlin.

### Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti, har Sunniva Poulsen talar.

Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Hans og Lív, Onnugøta 7. Verið øll hjartaliga vælkomin.

### KFUM og KFUK í Havn

Sunnudagin kl. 15 í KFUK limafundur við Ásu Kristiansen, Skála.

Mánadagin kl. 15 í KFUK eldrasamkoma við Torleif Johannesen, sjómanstrúboðara.

### Meinigheitshúsið í Havn

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 meinigheitsfundur, Bergur í Garði talar. Greitt verður frá arbeiðinum í farna ári. Kórsangur og offurgongd. Aftaná verður drekka og orðaskifti um arbeiðið í kjallaranum. Øll eru hjartaliga vælkomin. Meinigheitslegan verður í Nesvík 28. til 30. apríl. Tekning hjá Birgit Olsen, tlf. 314538, fax 318916.

### Frelsunarherurin í Havn

Sunnudagin kl. 11 halgunarmøti, eingin sunnudagsskúli. Kl. 18 familjutími, skótar og sunnudagsskúlin luttaka.

### Zion, Kollafjørður

Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Konfirmatión – Norðstreymoyar prestagjald

Konfirmatiónin í eystara parti av Norðstreymoyar prestagjaldi er ásett at vera í Hósvíkar kirkju pálmasunnudag 16. apríl kl. 11.

Farið verður at ganga til í Hvalvíkar missiónshúsi mánamorgunin 03. apríl kl. 08. Í hesum sambandi eru konfirmantar og foreldur/avvarðandi vælkomin til ein drekkamunn í Hvalvíkar missiónshúsi týskvøldið 28. mars kl. 20.30.

### Samkoman Ørkin

Evangeliskt møti verður í Arbeiðsmannafelagshúsinum Hæddini í Saltangará sunnudagin kl. 17.

### Kirkjan, Norðskála

Sunnudagsskúli verður í dag kl. 14.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 1000-ára haldið Norðskála

Sunnudagin kl. 16 í kirkjuni er fyrilestur, Martin R. Jacobsen: Apostólsku fedrarnir.

### 1000-ára haldið Glyvrar

Mánadagin kl. 19 fyrilestur og konsert við Eystankórinum. Magnus Jørgensen: Kaj Munk.

### Keldan, Skálafirði

Fríggjakvøldið kl. 21 bøn og breyðbróting.

Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.

Sunnudagin kl. 17 møti við luttøku av Tummas Jacobsen, barnamøti kl. 17.
http://kort.olivant.fo/~keldan/

### Missiónshúsið á Tvøroyri

Missiónsvikan heldur fram í kvøld við møti kl. 20 við talarum norðanfjørðs, Astrid og Hjørdis syngja.

Leygarkvøldið kl. 20 møti, talarar norðanfjørðs. Ulf, Ebba og Nimrod syngja. Innsavnan verður til húsið.

Sunnudagin kl. 14 familjumøti. Sunnukvøldið kl. 18 møti við talarum norðanfjørðs. Kór úr Porkeri syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Betel, Vágur

Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.

Mánadagin kl. 20 bønarfundur.

Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

### Samkoman, Sion Vági

Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.

Telefonandaktin svarar á 373777.

### Føroysk møti í Esbjerg

Sunnudagin 26.3. kl. 15.00 verður møti í Zionskirkens sognhus við Niels Jacob Nielsen.

### Heimamissiónin

Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

### Nærvarpið LUMI radio í Aalborg

Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10.00.

### Føroyska nærvarpið í Esbjerg

Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og verður endursend kl. 16.00.

## Gullbrúdleyp

**Í dag, leygardagin, kunnu hjúnini Ruth og Robert á Lakjuni, Fuglafjørður, halda gullbrúdleyp.**

**Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík.**

## Diamantbrúdleyp

**Í dag, leygardagin, kunnu hjúnini Fía og Jens Pauli (Boy) Joensen, Klaksvík, halda diamantbrúdleyp.**

**Dagurin verður hildin saman við børnum við familju.**